


# Hammershaimb er grivin í gamla kirkjugarði

**Í hesum døgum minnast vit, at 100 áru liðin síðan V.U. Hammershaimb doyði. Nakað samstundis vóru 190 ár liðin, síðan hann var føddur**


Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Vit hava fingið nógv at vita um V.U. Hammershaimb, men tey fægsti munnu vita, at hann eisini er "umboðaður" í kirkjugarðinum á Svínaryggi Havn, har systirin og tvey børn eru grivin.

Tey vóru bert tvey systkin. Systirin Maria Louise varð grivin her í 1873. Hon eigur tann vist elsta gravsteinin í kirkjugarðinum, har dagfesting sæst.

Tað, sum vit vita um Mariu, stendur í lívssøguni hjá V.U. Hammershaimb "Træk af mit Livsløb," sum er prentað í ritinum Frá Færøerne/Úr Føroyum, sum í síni tíð varð útgivið av Dansk Færøsk Samfund.

Vit fara at endurgeva brot úr hesi frásøgn, sum snúgva um Mariu og um felags lívið hjá teimum báðum systkjunum.

Maria var trý ár eldri enn Vensil, og foreldrini hjá teimum vóru Armgard Maria f. Egholm og løgmaðurin Jørgen Frantz Hammershaimb. Vensil var bert ársgamal, tá ið pápin doyði í 1820. Í 1822 máttu tey fara av løgmansgarðinum

Um hetta skrivar V.U. Hammershaimb m.a.:

## Óhugaligt at flyta til Havnar

Den første erindring fra min barndomstid er den dag, da min moder med sine to børn ved hånd måtte forlade Stegård, mødt på vejen af Sandevågs befolkning med kærlighed og rørende tak til den kære "løgmanskona" for godt samvær, ja, denne dag står for mig som en dag, hvor mit barnehjerte følte en stor sorg og smertelig bevægelse ved befolkningens tårefyldte øjne og rørende afskedshilsen som fulgte os til landingsstedet "úti í Hølk", hvor baaden lå, som skulde føre os til Thorshavn. Ja, til Thorshavn gik farten, hvor vi i fremtiden skulde have vores ophold hos min gamle mormoder i Nystue, Helene Christine Egholm f. Lund, enke efter skibsfører Samuel Egholm, hvor vi blev modtaget i kærlighed.

Der var en stor forandring fra det venlige Steig med de skønne omgivelser og rigelige indtægter, i gode år kunde der slagtes 2.000 får. (Hetta er ikki prentvilla!). I fremtiden måtte moder lade sig nøje med pension på 80 rigsdaler om året. Ja, der var forskel fra den skønne Vågø med de gode indtægter og frie liv til den lidet tiltalende handelsstad Thorshavn med de tarvelige indtægter.

Vel var lejligheden i min bedstemors hus indskrænket, men dog var det godt at være, thi der var hjertelighed og kærlighed, så der kunde være plads for andre. Således blev enken efter pastor Bechmann på Suderø, Henriette Tobiesen, ved hendes mands tidlige død med sin spæde datter optaget i Nystue, da hun følte sig så ene i Lejre præstegård og tog til Thorshavn og blev der hen ved et år.

## Súreplir fyri 180 árum síðani

Mine barnedage henlevedes altså i Thorshavn, og der fandt jeg til min glæde og oplivelse godt kammeratskab flere jævnaldrende sønner af embedsmænd, deriblandt landchirurgen Claus Manikus to sønner, August og Emil og flere færøske drenge, hvoriblandt jeg særligt nævner Johannes Joensen under Klett, den senere mangeårige hospitalforstander, som fik min gamle "lundapisa" ved min afrejse fra Færøerne.

En særlig anledning til, at disse mine legekammerater ofte besøgte Nystue var den, at en gammel kone Birthe på Klett i Thorshavn daglig kom til os og sad og strikkede i nordre stue, og hun var utrættelig at fortælle søgur, og hun fortalte godt, så August Manicus sagde til sin moder: "Hvorfor har vi ikke sådan en Bebbe (omma) her, som de har i Nystue?"

Vi legekammerater kom ofte sammen, snart hos den ene, snart hos den anden, dog mest hos Mørks, hvor der var stor lejlighed og plads til at tumle og røre sig inde i pakhuse og gårdpladsen.

Et sted blandt andre i Thorshavn, hvor jeg gerne kom, var ude på Reyn hos min moders farmoder, Armgard Maria Egholm f. Weihe. Når der kom skib fra Danmark fik hun ofte fra sin sønnedatter Anna Maria Hesselberg i Birkerød rød frugt tilsendt. Når den gamle oldemoder så mig komme, lod hun sin tjener Heina Poul gå hen i den store dragkiste for at lede et par gode æbler ud til den gode Vensil.



*MARIA LOUSIE HAMMERSHAIMB F. 4. DECEMBER 1815 D. 31. JULI 1873*

*KVINDENS PRYD… (Hetta er byrjanin til eina gravskrivt, sum annars er illa lesilig. Men hesi orðini geva so eina ábending um boðskapin*



*Hammershaimhjúnini saman við døtrunum Maria og Nanna. Tað ber ikki til at siga hvør er hvør, men Maria er tann eldra av teimum. Hon var fýra ár eldri enn Nanna*

## Fór niður at lesa

Hetta er so tann barndómur, sum Maria eisini hevur verið ein partur av. Tað góða, sum hann hevur notið, man hon eisini hava fingið.

Tá ið Vensil var 11 ár, varð avrátt eftir tilmæli frá próstinum Pram Gad, hansara seinni verfaðir, at hann skuldu fara niður at lesa. Hetta góðtók mamman, hóast hennara inntøkur vóru smáar.

Tann 20. oktober 1831 fór Vensil saman við mammuni við skonnartbrigguni Aurora til Danmark, meðan Maria var eftir hjá ommuni.

Tey fingu ein ringan túr niður. Hann tók fýra mánaðir. Mamman hjálpir Vensil at finna seg til rættis, og hon fer heim aftur.

Tá ið omman í Nýggjustovu doyr í 1834, gera mamman og systirin Maria Louisa av at búseta seg í Keypmannahavn, so tey øll trý kundu búgva saman.

"En billig lejlighed fik hun ved siden af Borgerdydskolen, hvor vi førte et lykkeligt samliv med hverandre, og skønt lejligheden var meget indskrænket, var det muligt af og til at se gode venner hos os, ja, endog en gang at holde færøsk dans der, hvor organist Berggreen (eisini kendur sum komponistur) og student Svend Grundtvig (kendur fyri sín íblástur til føroyska sjálvstýrisrørslu) var indbudne med. Der kom ofte en eller anden skolekammerat, som havde siddet over på skolen og var træt eller trængende til en lille pibe tobak og bad om lov til at hvile sig lidt."

Ein gestur tann 19. mai 1844 var Niels Skaale, hosumakari við kongaliga handilin, sum var á vitjan í Danmark. Hann er fyrr umrøddur í hesi røð. Aftaná, at tey høvdu fingið drekka fóru tey øll í kirkju til prestavíglsu.

## Kom væl við at tosað var føroyskt heima

Tað gekk væl hjá Vensil í skúlanum. Hann fer at lesa til prest. Eina ferð kemur ein professari Malan frá Kalkutta í India til Keypmannahavnar at kunna seg um norrøn mál. Hann vendi sær til etatsráð Rafn, maðurin aftanfyri okkara Føroyingasøgu, at fáa onkran at tosa føroyskt við. Hann setti seg í samband við Vensil. Hann sigur, at nú kom tað væl við, at hann, mamman og systirin Maria tosaðu føroyskt við hús.

Vensil verður giftur við Elisabeth Augusta Christrine Gad, dóttir próstin Pram Gad. Tey flyta í 1855 øll aftur til Føroyar saman við systkinabarnið Elisabeth Christiane Schrøter, vanliga kallað Guggan, sum kom at halda hús hjá Vensil. Tey ferðast við Havfruen, sum var eitt skip hjá kongaliga einahandlinum, har tað eisini var pláss fyri teirra innbúgvi. Men hetta gjørdist ein drúgv ferð, tí tað var nógvur mótvindur. Ferðin til Føroya vardi í 21 dagar, og kona Vensil var ring av sjóverki.

Endiliga komu tey til Havnar í besta veðri, men nú var stilli, so tað var ikki siglandi. Tá tað hendan dagin var grindadráp í Havn, hoyrdist ikki á landi, at teir skutu eftir loðsi.

Morgunin eftir kom bátur eftur teimum og førdi tey inn á eystaru vág. Tá var framvegis fult av grindamonnum í býnum. Leiðin gekk heim í Nýggjustovu.

Vensil fekk sítt fyrsta starv sum prestur í Kvívík. Tað skrivar hann eisini nógv um. Her vóru eisini tey fyrstu børnini fødd. Tey fingu eisini vitjan úr Danmark, millum annað av systrunum hjá konuni.

Mamman og systirin Maria komu eisini norður til Kvívíkar at ferðast, har tær eisini vóru á umferð við honum. Ta einu ferðina




*Herved undlader jeg ikke at tilmelde Hr. Sysselmand, at min Søster Jomfru Maria Louisa Hammershaimb i Morges Kl. 4 afgik ved Døden 57 Aar gammel. Arveberettigede efter hende ere kun vi to myndige Arvinger, Armgard Maria Hammershaim, Enke efter Lagmand J.F. Hammershaimb og undertegnede Provst V.U. Hammershaimb.*
*Thorshavn d. 31te Juli 1873*
*V.U. Hammershaimb*



*Nýggjastova í Gongini, har Maria Louisa Hammershaimb kom at búgva stóran part av lívinum, og har hon helst eisini endaði sínar dagar. Nýggjastova sær stórt sæð tað sama út í dag sum tá*

# Jørgen Hammershaimb: Var frísinnaður

Vit hava í hesum parti roynt at lýsa ókendu systrina hjá V.U. Hammershaimb. Her skal verða endurgivið brot úr brævið, sum Jørgen Hammershaimb (1859-1922), sonur Vensil í 1884 skrivaði til vinin hjá sær Jacob Djurhuus í Grønlandi. Jacob var tá deyður. Hansara søgu og søguna hjá pápanum, Faktorin, í Klaksvík, komu vit aftur til. Jørgen skrivar millum annað:

"Som du ved var jeg soldat sidste sommer og afsluttede min uddannelse men en kontinnementstur imellem Roskilde og Kalundborg paa noger over 2 uger. Det var en morsom men anstrængende tur. Vi legede rigtig krig og levede fuldstændigt paa feltfod. Vi kom ikke af klæderne i den tid og sov i lader og stalde og under aaben himmel – levede paa rugbrød, røget flæsk, brændevin, ærter og kødsuppe og asede det bedste, vi havde lært med vor 65 pund tunge udrustning i manøvrer og lange marchturer, somme tider en 50 km om dagen. Det var anstrængende, men et æventyrligt morsomt liv. Jeg kom hjem med lidt ledbrand i knæet, men det forsvandt dog hurtigt. Værre var det med en feber, jeg havde i 14 dage, efter at jeg var kommet hjem. Jeg laa en tid paa hospitalet og rekreerede mig saa i Lyderslev (hjá foreldrunum), saa at jeg ved nytaar var rask igen. Det var en lang tid at være syg, Men examen er blevet udsat til begyndelsen af marts. Men saa havde jeg glemt saa meget, at jeg ikke kunde klare mig, men blev nødt til at trække mig tilbage. Det tog naturligvis noget paa humøret, men det er det ikke noget ved at gjøre. Om et aar har jeg lov til at gaa op igjen. Ved siden af mine studier vil jeg nu have informationer, dels af intesse, dels for at kunne existere.

### Lítið nýtt í politikkinum

I politikken er der lidt nyt. Ministeriet Estrup er endnu ved roret men bliver pint og plaget af oppositionen. Folketinget har givet det en meget knap finanslov, som landstinget gaar ind paa, saa at ministeriet kun kommer til at føre en kummerlig tilværelse. Nogen forandring er ikke at vente før efter de nye valg i juli maaned, som næppe bliver til gunst for ministeriet. Det burde være forsvundet for længe siden, men højrepartet vil lide tab ved et ministerskifte. Dog er jeg vis paa, at det ikke kan nytte noget at standse frihedsbevægelsen, som i hovedpunkterne trods ministerium, højreparti og højrepresse har min fulde sympati. I Norge er ministeriet Selmer dømt fra deres embede af en rigsret, og der har Højre ved en ufornuftig, lidenskabelig politik lidt stort tab. Saadan kan det ogsaa komme til at gaa hos os, hvis regeringen ikke i tide giver efter.

I Sudan er der krig, i hvilken England har blandet sig ind i. I Tonkin kæmper Kina og Frankrig. Ellers er der roligt overalt."

Her sæst, at Jørgen hevur verið frísinnaður maður. Hann fekk annars eisini sína útbúgving og gjørdist yvirlærari á kostskúlanum Herlups Holm nærindis Næstved.



*Havfruen, sum V.U. Hammershaimb kom heim við, tá ið hann við familju fluttu til Føroyar. Maria var eisini við í ferðalagnum*

fóru tey øll trý vestur í Vágarnar at vitja Lange prest, og tá vitjaðu tey nógvar vinir í oynni. Hesa ferðina prædikaði Vensil í kirkjuni í Miðvági.

Seinni, í 1856, komu snarboð úr Nýggjustovu eftir Vensil, og hann skundaði sær til Havnar saman við systrini. Hon tykist at hava verið hjá honun tá. Mamman liggur tá sera ring av næsablóð, men hon kemur so fyri seg aftur.

Í 1861 mistu hjúnini Hammershaimb sonin Pram, og hann varð grivin í Havn. Eftir at tey vóru komin inn á Nes, mistu tey aftur ein nýføddan son, og Vensil fór til Havnar at jarða hann. Tískil eru tveir av teirra synum jarðaðir í gamla kirlkjugarði í Havn.

### Gugga og Maria doyggja

Í 1873 doyði Gugga, 70 ára gomul. Hon hevði staðið fyri húsarahaldinum hjá Hammershaimb alla hansara tíð. Børnini elskaði hana, og hon hon elskaðu tey. Hennara lík varð við báti ført til Havnar at verða jarðað har. Við bátinum var skúlalærarin úr Saltnesi, sum leiddi sangin.

Sonurin Hjalmar kom heim at ferðast og nú hoyrist tað seinasta um Mariu. Vensil skrivar:

"Samme dag, som Hjalmar rejste, døde min søster. Hun havde hele sit liv været en korsdragerske, men da jeg, den dag hun døde, sad hos hende og talte med hende, sagde hun til mig: "Baggi, sum Gud tó hevur verið góður við okkum." Hun blev begravet fra Thorshavn Kirke og over hende talte pastor Jensen fra Sandø og jeg."

Tað merkiliga er, at hvørki Gugga ella Maria eru nevndar í protokollini hjá kirkjugarðinum, sum hevur verið førd frá 1868.

Hetta er vist tað, sum vit vita um Mariu Hammershaimb. At hon hevur verið ein "korsdragerske" man merkja, at hon hevur verið sjúklig. Tað er neyvan ivi um, at tað hevur verið gott samband millum systkini bæði.

Í 1866 fekk Vensil eina dóttir, sum fekk navnið Maria. Tað kann væl hugsast, at hann hevur viljað kallað upp systrina, sum tá var so mikið til árs, at hon ikki fekk nakað barn sjálv.

Yngra Maria varð virkin limur í Føroyingafelag í Keypmannahavn. Hon fekk útbúgving í sjúkrafimleiki og massagu. Hon doyði í 1941.

Vensil sjálvur flutti í 1878 til Danmarkar at búgva, og her er hann so eisini jarðaður.

**Komandi partur**
Í komandi parti fara vit lýsa Esbern Müller, son Søren og teirra ætt